## DAGSINS MEINING

# Svartakjaftaørskapur

Tað hevur víst seg at vera torført at gera avtalu um at avmarka veiðuna eftir svartkjafti. Talan er um fiskastovn, ið ferðast um eitt stórt øki, sum eina tíð er í altjóða sjógvi og sum so aðrar tíðir er í sjógvi hjá einum av strandalondunum. Veidd vórðu í fjør millum hálva aðru og tvær milliónir tons, sum verða nýtt bæði til matna og fóður. Svartkjafturin verður eisini nógv brúktur sum býtisfiskur, eitt nú hava vit føroyingar í mong ár fingið týðandi fiskirættindi í russiskum og norskum sjógvi fyri at loyva teimum at veiða svartkjaft hjá okkum.

Tann var tann tíð, tá føroyingar sóu stórar møguleikar í svartkjaftinum, og íløgur vórðu gjørdar í verksmiðjutrolarar, ið skuldu framleiða til matna. Hvussu gekst við hesum er søga, men kortini er tátturin tikin uppaftur nú seinast við Nærabergi, ið hevur framleitt surimi úr svartkjafti. Svartkjafturin hevu stóran týdning fyri føroyska búskapin. Hann eigur lívið í pørtum av flotanum, sum fiskar heima og burturi og virkjum á landi.

Tað er eingin loyna, at veiðutrýstið hevur verið alt ov stórt, og nú verður so roynt at minka veiðuna eftir tilmæli frá fiskifrøðingum. Mælt verðu til í mesta lagi at veiða 600.000 tons tvs. at veiðan skal skerjast við einum triðingi. Nú meðan londini royna at finna útvegir fyri eini lækking lata norðmenn eina bumbu bresta. Teir ætla sær ikki at lækka veiðuna men fara at fiska 600.000 tons einsamallir. Tvs. alla heildarkvotuna. Frægi fiskifrøðing okkara Hjalti í Jákupsstovu sigur við Útvarpið, at útspælið frá norðmonnum er ørskapur.

Føroyingar og norðmenn hava altíð havt góð viðurskifti og mangla rósandi og mergjaðu orðini heldur ikki tá, norðmenn tosa um føroysku frændirnar. Noreg er eitt av heimsins ríkastu londum. Tað er partur av einum samstarvi í Norðuratlantshavi, sum so sanniliga eisini inniber nakrar skyldur mótvegis grannum og náttúrutilfeingi, sum bæði norðmenn og tess grannar skulu liva av. Við at taka hetta stigið hava norðmenn stungið grannar sínar, eitt nú okkum føroyingar, í ryggin. Tí teirra gerð kann koma at forkoma hesum stovninum, sum í dag hevur nógv størri týdning fyri føroyska búskapin uppá seg enn hann hevur fyri Noreg. Sæð við samfelagsligum eygum átti einki at verið til hindurs fyri hjá norðmonnum at skert sína veiðu. Ístaðin leggja teir upp til at oyða ein týðandi fiskastovn, sum er týðandi súla undir okkara búskapi. So tá Hjalti í Jákupsstovu brúkar orðið ørskapur hevur hann so rætt so rætt. Hetta er ørskapur móti stovninum, móti okkum føroyingum og í síðsta enda móti norðmonnum sjálvum. Teir áttu at vitað betur og hugsað um, hvussu sildin varð niðurfiskað á sinni. Landsstýrið og føroyskir myndugleikar eiga ikki at lata sær hetta lynda. Vit mugu royna at tosa norðmenn til fornuft og mótmæla halda teir fast við hetta. Hetta borgar ikki fyri góðum framtíðar samstarvi, og her verður eisini hugsað um ta samvinnu, sum bæði norðmenn og vit ynskja á oljuvinnuøkinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Oljupengar nú ella í framtíðini?

**Fái fleiri føroyingar inn um í altjóða oljuvinnuni ! Tað verður til búskaparligt gagn longu í dag og ikki einans í eini møguligari framtíð**

**Leila á Lofti**
*chess@post.olivant.fo*



Nú kjak hevur tikið seg upp, um avkastið frá einum komandi búskapargrunni skal umsitast av borgarunum ella av tí almenna, er tað sjálvsagt fyri mær, at borgarin eigur avkastið í báðum førum, væl at merkja, at har verður eitt avkast.

Føroyar hava tann fyrimunin, at vit kunnu javnmeta ymsar virkandi skipanir í øðrum londum, og har frá taka støðu til tað fyri Føroyar best hóskandi modellið.

Lat meg bara leggja aftrat tað, helst fleiri enn eg hava fingið varhugan av, at tað tekur tíð at fylla í búskapargrunnin,og er hann tí ikki nakað, vit vanligu borgarar koma at merkja í dag ei heldur í morgin, men um nøkur ár.

Tá grunnurin gevur avkast,so skal tað røkka til tey, ið tá liva eins og eftirkomararnar.

Hví er so lítil politiskur áhugi fyri at kjakast um, hvat vit kunnu gera fyri vanliga føroyingurin í meðan vit bíða, tá um oljuvinnu verður tosað ?

Her hugsi eg um at skapa karmar, ið stuðla einstaklingum, so teir fáa betri møguleikar at taka lut í hesa vinnu, eini vinnu ,sum ivaleyst bara verður í Føroyum ein brøkpart av árinum ella kanska slettis ikki í nøkur ár.

Tí mugu føroyingar út í ta altjóða oljuvinnuna at gera avtalur við ymisk olju- og veitingarfeløg.

Føroyingar eru sera kappingarførir, (maskinmeistarir,elektrikarir,sveisarir o.líkn.) tá javnmett verður við fólk, sum longu eru í vinnuni, men her eru onnur viðurskiftir, ið eru við til at forða teimum at taka lut í tí altjóða oljuvinnuni, sum til dømis høgar ferðaútreiðslur,ið ikki kunnu dragast frá í skatti longur, og manglandi kontaktir til útlensk feløg. ( Sum eg gjøllari havi viðgjørt í bløðunum áður. )

Hetta vildi eg mett verða eitt týdningarmikið økið at stuðla ( ella rættari at skapa karmar til), so vit kunnu byggja upp eina ískoytandi vinnu, eina vinnu, sum á altjóða støði heldur fram óávirkað av gongdini í Føroyum.

Gagnligt fyri okkara samfelag, vildi eg mett.

Skuldi tað víst seg, at virksemi í føroysku oljuvinnuni verður lítið ella av ongum, so vil tann altjóða vinnan halda áfram.

Hava vit ráð at siga nei takk til útlendskan kapital?

# Isolatión

**Oddvør Johansen**



Í løtuni lesa vit í bløðunum, at sjey mans sita í varðhaldinum í Havn, skuldsettir í stórum rúsevnamáli.

Flestøll munnu vera samd um, at tað er gott, at løgreglan steðgar øllum ólógligum handli av hesum evnum, sum aloftast eru oyðileggjandi fyri fólk.

Tó er at undrast á, at vit her í Føroyum eru so ýðin eftir at døma fólk í isolatión, avbyrging. Vit hoyra um, at ung fólk eru avbyrgd – fyrst í 14 dagar, og síðani verður hetta longt við 4 vikum aftrat, tilsamans 6 vikur = 42 dagar. Og tað tykist, sum er hugburðurin her á landi, at hetta er í fínasta lagi.

Undirritaða fer at tala ímóti hesum ræðuleika.

Í meira enn 25 ár hava klók fólk úti í heimi harðliga funnist at øllum formum fyri avbyrging, tá ið tað ikki er beinleiðis vandamikið fyri onnur fólk.

Isolatión er ein leivd úr miðøldini. Hon er ómenniskjanslig. Hon er sálarliga niðurbrótandi, eitt slag av torturi, og av somu orsøk hevur avbyrging verið vanligt amboð í einaræðis- og terrorstýrdum londum.

Sum dagarnir ganga, broytist tann avbyrgdi. Hann hevur eingi tilboð og einki sosialt samband og verður ofta tungur í huga. Hann fer at kenna seg gloymdan og plágast av tonkum sum, um hann man vera rættsiktaður, um hann hevur dagaskil, um nøkur framtíð er fyri hann. Verður hann fólk aftur? Ella hevði tað verið best at gjørt ein enda á øllum?

Túsundtals vitni greiða frá hesum í bókmentum úr allari verðini.

Í Føroyum veit almenningurin einki um, hvussu ein føroysk avbyrging í praksis fer fram. Tí hesir spurningar til fútan:

- Sleppur avbyrgdi at lesa?
- Sleppur avbyrgdi at lurta eftir útvarpi?
- Sleppur avbyrgdi at hyggja í sjónvarp?
- Sleppur avbyrgdi at tosa við lækna/sálarhirða?
- Sleppur avbyrgdi at venja likamið?
- Ella hevur avbyrgdi einans samband við onnur fólk undir avhoyringunum, og tá ið borðreitt verður í klivanum?

Eg heiti á avvarðandi løgtingsnevnd um at síggja til, at alt fer fram á rættan hátt.

Og eg heiti á Føroya Løgting um at virka fyri, at øll avbyrging í føroyskum varðhaldum heldur uppat alt fyri eitt.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Barnagarð til Landssjúkrahúsið

**Jógvan við Keldu**
*løgtingsmaður*



Landsstýrismaðurin kann ikki arbeiða við nakrari "prinsippiellari loysn um barnagarð á Landssjúkrahúsinum við gjaldi úr Landskassanum". – Aðrir møguleikar eru tó, um so er, at Tórshavnar kommuna ella feløg byggja og reka barnagarð.

Sjálvandi skal barnagarður byggjast til Landssjúkrahúsið – um hetta er ynski hjá Tórshavnar kommunu. Her eru vit púra samd. Tað vit eftir øllum at døma ikki kunnu semjast um er, at eitt tílíkt mál skal fylgja landsins lógum og viðtøkum, og at rætti viðkomandi skal gjalda rokningina.

Eg royndi við spurningum mínum at fáa teg at innsíggja, at hetta er bæði rætt og rímiligt. At tú velur at ignorera spurningarnar – og ikki at svara einum tí einasta – er so tín søk

Eg má kortini tulka svarið sum eina staðfesting, at tú ert samd við mær í, at støðan er júst so-leiðis, sum eg nevndi, og at tað ikki er rímiligt, at Tórshavnar kommuna roynir at senda rokningina fyri barnaansing við Landssjúkrahúsið til landskassan og harvið lutvíst til útjaðarakommunurnar.

**Argumentini hjá Annitu bera ikki uppi**

Tá tú kortini mælir til, at tað órímiliga skal henda, at útjaðarakommunur við um 20% lægri miðalinntøkum, uttan almennanr stovnar, og tí hægri skattaprosenti enn Tórshavnar Kommuna, eiga at gjalda fyri barnaansing í Havn, so man hesin politikkur Tjóðveldisfloksins staðfesta tað, eg førdi fram um ta nýggju sentralistisk/sosialistisku kós, flokkur tín nú tykist hava lagt. Kanska er hetta eisini tekin um opportunismu hjá einum valevni í Suðurstreymoy upp til eitt løgtingsval.

Meginparturin av svari tínum er bert uttanumtos, og argumentini bera ikki uppi. Postulatið um, at hetta málið er nakað serskilt og at hesin barnagarður má vera opin alt samdøgrið, fyri at vit skulu fáa fólk at trívast og støðast á Landssjúkrahúsinum, er ikki sørt konstruerað júst til høvið. Slíkt hevur verið nýtt áður, og í alt ov nógv ár hava aðrar kommunur funnið seg í hesum hátti. Men einferð má vera nóg mikið, hóast eg enn ikki hava sæð borgarstjórarnir í hinum kommununum í K.S.F. mótmælt hesum. Tað tykist mær løgið.

**Kommunal ábyrgd**

Lógin um barnaansing, sum júst er lýst, og sum vit bæði flokkar okkara og samgongan hava samtykt, er einasta lóg, sum er galdandi á økinum í dag. Hon sigur greitt, at barnaansing nú er kommunal ábyrgd.

Er tað rætt, sum tú sigur, at "Landsstýrismaðurin arbeiðir við eini prinsipiellari loysn, sum skal vera langsiktað, og sum kann nýtast til fyrimynd um líknandi tørvur skuldi víst seg aðrastaðni," og at hesin er gjald úr landskassanum, so arbeiðir hann ímóti lógini og landsstýrinum, og tað er ein álvarslig søk. At samgongan hevur eina ætlan um at byggja barnagarð til Landssjúkrahúsið er ikki rætt, og protokollatið, tú sipar til, er ikki nakað, tú kanst taka tær til inntøku, tí tað er als ikki aktuelt.

Og síðani peningarenslið, og fyrilesturin hjá Annitu um, at "Hvør av øðrum liva má". Jú takk. At tað skal bera til hjá einum politikara at gera seg so blindan, at "ikki skal bera til í nakrari blaðgrein at geva eina sakliga lýsing, hvørki av peningarenslinum millum valdømi, ei heldur av støðuni í hvørjum valdømi sær," man vera eindømi í føroyskari politiskari søgu.

**Land og kommunur skulu halda seg til lógarkarmarnar**

Vit tosa ikki um Kina ella ES. Vit tosa um Føroyar, og tær nýtist ikki at vera búskaparfrøðingur fyri at síggja, hvørji øki eru framleiðandi og útflutningsøki. Tað sama er galdandi, tá vit tosa um megin nýtsluna av danska peningastuðlinum til Føroya.

Vit bæði úr samgonguni vilja hava, at vit føroyingar klára okkum sjálvar peningaliga. Vit vilja, at føroyingar sjálvir gjalda fyri tað, vit njóta og nýta. Tað er fyri okkum ein skomm at senda øðrum rokningina.

Og tá tú, Annita, sigur, at "tá ein skal hava, skulu vit eisini hava". Tað skal vera tað eg leggi upp til, so er hetta ólátað og ikki "pent" av tær. Tú veitst betur.

Hetta snýr seg um viðurskiftini Danmarkar og Føroya millum, har vit senda tí størra rokningina. Ikki minni, Annita, eigur hetta at vera galdandi í viðurskiftunum her heima á landi, millum eina lutvíst múgvandi kommunu og føroysku útjaðarakommunurnar. summar av teimum eru um at avtoftast, mest orsakað av sosialistiskari stýring gjøgnum nógv ár.

Vit kunnu byrja at bøta um hesa skeivu gongd við m.a. at krevja at allar føroyskar kommunur halda seg innan fyri teir lógarkarmar, sum okkara samgonga júst hevur smíða.

Aftursvar til Búskaparráðið:

# 2000 familjur á uppboðssølu

**Bjarti Mohr**



Eg havi lisið kronikkin hjá formannskapinum í Búskaparráðnum. Rætt er tað, at vit skulu hava eitt sakligt tjak. Fiskivinnuuppskot tykkara kemur at kollvelta allan tann føroyska fiskiflotan, líka frá útróðri til rækju - og flakatrolarar, tí eg gangi út frá, at alt tilfeingið sum tað er, skal á uppboðssølu. Og tað næsta má væl vera, at vatn til elverk, fuglur, jørð og kol eisini skal á uppboðssølu. Modellið við tilfengisrentu er elligamalt og hevur verið roynt m.a. í Sovjetsamveldinum undir harðrendum einaræði.

Ikki er grundarlag fyri at gera íløgur, tá ið fiskivinnupolitikkurin áhaldandi verður broyttur. Óstøðugu viðurskiftini koma at gera tað uppaftur verri at fáast við fiskiveiðu.

Uppskot tykkara er ikki ein skatta - ella avgjaldsspurningur. Nei uppskoti tekur alt grundarlagið undir føroyskari fiskiveiðu burtur - og tað er hetta sum er grovasta álop á føroyska fiskiveiðu nakrantíð. Føroyski fiskiflotin er rikin av so gott sum øllum fjarleiðum og nú manglar bara tann endaliga avhøvdingin, so eru eingir fiskimenn eftir og heldur ongi reiðaríir. Hvør ið verður glaður er ilt at siga, men gott fyri Føroya land verður tað ikki.

Føroyskar fyritøkur hava ikki fíggjarligan førleika at luttaka í hesari uppboðssølu, tí tær hava longu bundið meginpartin av kapitalinum í skip og veiðuloyvir. Vinnulívsfólk, útróðrarmenn og fiskimenn eru í góðari trúgv farin til verka og hóast mótburð so hevur okkara fólk hóðra undan í øldir.

Eg havi í huga tær umleið 2000 familjurnar sum liva av fiskiveiðu. Hesi umleið 8000 fólkini (mammur og børn írokna) vera send út í eitt fíggjarligt óføri, tí teirra lívsgrundarlag, nevnliga útróðrarbáturin ella tjansurin við einum fiskiskipi verður tikin frá teimum og sett á uppboðssølu. Tískil fáa vit ein sosialan skeivleika, við tað at ein ógvuslig miðsavnan av flotanum verður ein beinleiðis fylgja av uppskoti tykkara. Serliga verða smæri plássini í Føroyum illa fyri. Flakavirkini koma eisini illa fyri tí tey klára ikki at gjalda meirkostnaðin fyri fiskin, sum verður ein náttúrlig fylgja av uppskoti tykkara.

Tað verður soleiðis at tær fyritøkurnar - serliga útlendskar - sum hava nógvan kapital koma eftir stuttari tíð at drena smærru føroysku fyritøkurnar og einkultpersónar fyri gjaldføri. Tú klárar ikki at kappbjóða ímóti eini fyritøku sum hevur 100 mió.kr. ella meira at arbeiða við, tað letur seg rætt og slætt ikki gera. Tey flestu reiðaríðini fara tí av knóranum eftir heilt stuttari tíð - og í heilt nógvum reiðaríðum eru fiskimennirnir partaeigarar, so her verður eitt ógvusligt bakkast hjá nógvum føroyingum.

Tí verður tað bara ein spurningur um stutta tíð so vera heldur ikki føroyskar fyritøkur við longur og vit hava í veruleikanum avreitt øll okkara rættindir til útlendingar - hetta hóast formliga sølan gongur ígjøgnum føroyska upp boðssølu. Serliga vandamikið og freistandi er hetta nú oljuvinnan stendur fyri durðum. Haraftrat kemur at útlensku fyritøkurnar fáa millióna upphæddir í stuðli frá ES so tað verður vónleyst hjá okkum føroyingum at bjóða ímóti teimum. Vit mugu so konstatera at alt stríði við at fáa 200 fjórðinga fiskimark hevur verið til fánýtis, tí vit koma at avreiða alt okkara tilfeingið til útlendingar kortini.

Hinvegin so er einki sum forðar nøkrum at koma inn í fiskivinnuna í dag. Tað er bara ein spurningur um at hava vitan, áræði og sjálvandi eitt sindur av eginpeningi eisini. Tað hava ongantíð verið so góðir møguleikar sum beint nú. So tann sum vil, hann kann eisini, tað er púra vist. Men teir allarflestu hava arbeitt seg upp frá trolaradekkinum ella egningarskúrinum og tann lívsroyndin er altso neyðug skalt ein vera í hesari vinnuni. Tað er fávitska at halda nakað annað.

Tann samfelagsliga rokningin og sosialu fylgjurnar vera nógva ferðir størri enn tann møguliga inntøkan sum kemur av uppskoti Búskaparráðsins.

Hetta hevur ein framstandandi íslenskur professari í búskapi eisini víst á. Og sum búskaparfrøðingur sjálvur, skilji eg ikki at tit vilja seta allan tann føroyska útróðrar - fiskiflotan uppá spæl við einum eksperimenti hvørs úrslit vit longu hava sæð sosialu fylgjurnar av nógva staðni í heiminum m.a. fyrrverandi Sovjetsamveldinum. Tað kann gott vera at eg taki í so rívan til yvirfyri Búskaparráðnum, men tað er ikki uttan grund. Her er veruligur vandi á ferð fyri øll sum liva av føroyskari fiskivinnu.

Orð Jóannes Patursson-ar: " Tit dripið hava føroyingin í Føroyum " er tað sum rennur einum til hugs. Lat hetta ikki henda.


Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!